## Varpa ljós á blokkniðurskurðin

Reyðu lampurnar yvir føroyska búskapinum lýsa sterkari og sterkari. Seinasta árið ella so hevur verið greitt, at góða búskapargongdin við høgum fiskaprísum og stórum fiskanøgdum fór at venda og verri tíðir lógu fyri framman.

Fíggjarmálaráðharrin, Bárður Nielsen, hevur sagt alment, at hall verður á fíggjarlógini 2004. Í kjalarvørrinum av fíggjarlógarhallinum 2004, hevur blokkniðurskurðurin hjá undanfarnu samgongu seinastu vikurnar verið umrøddur, sum ein av høvuðsørsøkunum til hallið við árslok 2004.

Vit hava tosað við formannin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, fyrrverandi fíggjarmálaráðharran, Karsten Hansen og nýggja fíggjarmálaráðharrin, Bárð Nielsen um týdningin av blokkniðurskurðinum fyri føroyska búskapin í 2004

# Óðamannaverk

**Fíggjarmálaráðharrin, Bárður Nielsen, heldur, at tað var óðamannaverk at skerja blokkin við heili 366 mio. krónum. Hann er kortini noyddur at góðtaka treytirnar, at blokkstuðulin er lækkaður og sigur , at tað kemur ikki upp á tala at hækka hann aftur**



BLOKKNIÐURSKURÐUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen og Sambandsflokkurin søgdu seg verða ímóti, at blokkstuðulin varð skerdur við 366 mio. Sambandsflokkurin og Fíggjarmálaráðharrin góðtaka kortini, at blokkurin er skerdur, og siga seg vilja arbeiða undir teimum fortreytum.

Bárður Nielsen sigur, at tað kemur ikki upp á tal, at blokkstuðulin verður hækkaður aftur. Hann er kortini framvegis sannførdur, at tað í síni tíð var óðamannaverk at skerja blokkin við 366 mio. krónum.

- Arbeiðið í samband við niðurskurðin var ikki væl gjørt, tí bert yvir eina nátt varð blokkurin skerdur við heili 366 mio. krónum.Vit høvdu yvirgóðar tíðir við 400-500 mio í yvirskotið og hetta er ikki vanlig støða í føroyska samfelagnum. Skuldi blokkurin verið skerdur, skuldi tað sjálvsagt verið í tráð við normalu búskaparstøðuna og ikk eina óvanliga góða, sigur Bárður Nielsen.

### Tátta ikki í íløgum

Bárður Nielsen tekur undir við Hermanni Oskarssyni at undanfarna samgonga ongantíð framdi neyðugu tillagingarnar í samband við niðurskurðin.

Bárður Nielsen sigur seg ætla at virka fyri at neyðugu tillagingarnar í almennum útreiðslum verða framdar, men hann ásannar kortini, at niðurgongdin í løtuni ger tað torførari at tátta í búskaparliga.

- Vita hava longu tikið stig til at minka talið av aðalstýrum, og tað er eitt stig á leiðini. Tað er væl torførari at tátta í, tá tað kemur til íløgupartin, tí skerja vit í íløgunum er stórur vandi fyri, at niðurgongdin verður enn størri. Vit mugu tí halda á við at byggja skúlar og vegir, tí tað er við at skapa virksemi í landinum og halda samfelagshjólunum koyrandi, greiðir Bárður Nielsen frá.

Bárður Nielsen sigur, at tað er rættiliga avmarkað, hvørja ávirkan nýggja ABC-samgongan hevur á fíggjarpolitikkin fyri 2004, tí nú er so langt frálíðið.

Hann greiðir frá, at tað verður ikki fyrr enn í 2005, at nýggja samgongan kann gera sína ávirkan galdandi. Hann væntar framvegis, at hall verður á fíggjarlógini í ár og slær fast, at skal búskaparliga niðurgongdin vendast er neyðugt, at fiskaprísirnir fara upp aftur.



# Tillagingarnar vantaðu

**Formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, heldur ikki tað er rætt at geva blokkniðurskurðin hjá undanfarnu samgongu skyldina fyri, at føroyski búskapurin gongur verri tíðum ímóti. Hann harmast, at undanfarna samgonga ongantíð gjørdi neyðuga búskaparligu tillagingarnar, tá blokkurin varð skerdur.**

BLOKKNIÐURSKURÐURIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, heldur tað er at snúgva sær undan veruleikanum at geva blokkniðurskurðin hjá undanfarnu samgongu skyldina fyri, at fíggjarlógin fyri 2004 eftir øllum at døma fer at geva hall. Hann rør framm undir, at tað eru nógvar avgerðir í fortíðini, sum eru við til at ávirka fíggjarstøðuna í dag.

- At geva blokkniðurskurðinum einsamøllum skyldina fyri niðurgongdina er burtur við. Tað eru nógvar inntøkur, sum eru mistar gjøgnum árini. Eg kann nevna skattalættan hjá undanfarnu samgongu, sjómannafrádráttin, MVG-fríar vinnur os. fr. Tí ber als ikki til at geva blokkniðurskurðin einsamøllum skyldina, greiðir Hermann Oskarsson frá.

### Eingin uppfylging

Blokkstuðulin úr Danmark varð 1. januar 2002 skerdur við 366 mio. krónum og árliga heildarveitingin frá dønum er sostatt í 615 mio. krónur. Kjakið um blokkniðurskurðin fyri góðum trimum árum síðan var drúgt og formaðurin í Búskaparráðnum vísti tá fleiri ferðir á, at varð heildarveitingin skerd, var alneyðugt, landsstýrið minkaði almennu útreiðslurnar.

Undanfarna samgonga økti hinvegin almennu útreiðslurnar við einari slakari milliard.

- Undanfarna samgonga framdi ongantíð neyðugu tilllagingarnar í samband við blokkniðurskurðin, hóast hon hevði knallgóðar treytir við lágari rentu og frálíkum inntøkumøguleikum. Tað er barnalærdómur, at tá inntøkurnar minka, koma pengar at mangla í, um ikki fremur nakrar sparingar, sigur formaðurin í Búskaparráðnum.

### Heldur á

Hermann Oskarsson hevur hug at samanbera fíggjarpolitikkin hjá undanfarnu samgongu í samband við blokkniðurskurðin við skattauppskotið hjá samgonguni.

Hann fýlist á, at ABC-samgongan ikki hevur nakað uppskot um, hvussu skattalættin skal fíggjast, tí tað er givið, at skattalættin fer at hava við sær færri inntøkur í landskassan.

- Tað er prógva, at ein skattalætti ikki er sjálvfíggjandi. Tað er líkamikið um tú tosar um blokkniðurskurð ella skattalætta, tí úrslitið er ein minking í inntøkum í landskassan. Øll kunnu taka undir við at rinda minni í skatti, men borgararnir hava eisini krav at fáa at vita um lægri skattatrýst hevur verri tænastustøði við sær, sigur hann.

### Óheppin

Spurdur, um tað ikki er ov tíðliga at hava undirskot á fíggjarlógini fyri 2004, tá hugsað verður góðu úrslitini seinastu árini, svarar Hermann Oskarsson, at tað er ringt at siga, at tað er ov tíðliga.

Hann vísir á, at búskaparliga niðurgongdin hesaferð kom brádliga og í einum høggi.

– Tað er eitt stak óheppi samanfall, at rækjuvinnan og alivinnan komu so illa fyri og at vit fingu eitt prísfall á toski og hýsu. Niðurgongdir henda av og á, men vit hava verða óheppin, tí vinnur sum hava verið óheftar av hvørjum, hava fingið eitt dýkk. Niðurgongdin er ikki nøkur katastrofa, men tað er kortini ikki serliga behagiligt, sigur Hermann Oskarsson.

### Vandamikil ósemja

– Tá vit tosa um almennar útreiðslur, haldi eg, at vit hava eina vandamikla ósemju í løtuni. Ein partur av politisku flokkunum hevur sum málsetning at minka ríkisveitingina, meðan ein annar partur vil lækka skattin. Koma hesir flokkar skiftivís í samgongu, kann gongdin gerast sera óstøðug og kann føra til stór hall í almennu roknskapunum, sum frá líður, greiðir Hermann Oskarsson frá.

Hann heldur at gongdin við skiftandi landsstýrum, sum øll leggja dent á at minka um inntøkurnarantin við skattalætta ella minking av ríkisveitingini er í andsøgn við at almennu uppgávurnar gerast dýrari og dýrari.

Hann sipar eitt nú til heilsuverkið, skúlaverkið og almannalóggávuna, sum gerast alt meira kostnaðarmikið, meðan samgongurnar gjara út í almennum útreiðslum.

# Fortíðin var ein forðing

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, sigur, at tað var ein trupul uppgáva at skerja almennu útreiðslurnar í tráð við blokkniðurskurðin.**
**– Vit høvdu eitt eftirsleip frá undanfarnum samgongum, har ongar íløgur ella lønarhækkanir vórðu framdar, sigur hann.**



BLOKKNIÐURSKURÐUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í viðtalu við Hermann Oskarsson aðrastaðni á síðuni, fýlist formaðurin í Búskaparráðnum á, at neyðugu tillagingar í samband við blokkniðurskurðin ikki vórðu framdar av undanfarnu samgongu.

Hermann vísir á, at almennu útreiðslurnar lækkaðu ongantíð í tráð við mistu inntøkurnar, tá blokkstuðulin 1. januar 2002 varð skerdur við 366 mio. krónum.

Karsten Hansen stóð á odda fyri fíggjarpolitikkinum, tá blokkstuðulin varð skerdur farna samgonguskeið og vit hava sett honum spurningin, hví neyðugu tillagingarnar ikki vórðu gjørdar í samband við niðurskurðin.

- Tú kanst møguliga siga, at niðurskurðurin ikki varð fylgdur nóg væl upp. Tú mást eisini minnast, at vit hingu upp á eitt eftirsleip frá undanfarnum samgongum, har ongar íløgur og lønarhækkanir vóru framdar. Vit hingu tískil upp á ein stóran íløgutørv og lønarhækkanir, sum ikki gjørdi tað lættar at skerja í almennu útreiðslunum, svarar Karsten Hansen.

Íløgurnar sum fyrrverandi Fíggjarmálaráðharrin sipar til eru millum annað Landsjúkrahúsið, Smyril og ikki minst eldraøkið.

*Tað var væl ikki eitt eftirsleip at økja talið av aðalstýrum?*

Nei tað er rætt. Tað var ein politisk avgerð og sum flestum kunnugt ein politisk telving millum samgonguflokkarnar, sigur hann

### Verri enn væntað

Seinastu vikurnar er komið fram í ljósmála, at fíggjarlógin fyri 2004 fer óivað at geva undirskot. Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin úr Klaksvík hevur funnist at nýggju ABC-samgonguni fyri bara at lata standa til og ikki taka neyðugu stigini til fáa fíggjarlógina at javnviga. Hann heldur tað er ógvuliga vandamikið at gera støðuna verri enn hon er.

– Vit hava í dag eina niðurgongd, men tað er ikki óvanligt, at lond av og á hava ring ár. Samgongan hevur tosað um at lata standa til, men tað vænti eg kortini ikki teir fara at gera, sigur Karsten Hansen.

Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin vísir á, at búskaparliga niðurgongdin er væl verri enn væntað. Hann sigur, at hevði undanfarna samgongan vita, at niðurgongdin kom so brádliga, høvdu átøk óivað verið gjørd.

- Eingin hevði forútsæð hesa gongdina. Kreppan í alivinnuni gjørdist nógv kraftigari enn bæði pengingastovar og alararnir sjálvur høvdu væntað, sigur hann.

### Rætt

Karsten Hansen er ikki ein løtu í iva um, at tað var ein røtt avgerð at skerja blokkin við 366. mio. krónum. Hann heldur hinvegin, at skerjingin skuldi verið gjørd áðrenn 2002.

Ikki heilt óvæntað sigur tjóðveldistingmaðurin seg vilja arbeiða fyri einum sjálvberandi føroyskum búskapi.

Blokkurin er ein sovipúta. Skerdu vit ikki blokkin tá, beri eg ótta fyri, at long tíð var frálíðin, áðrenn endaliga stigið varð tikið. Blokkurin skal burtur, tí vit skulu jú klára okkum sjálvi, sigur Karsten Hansen at enda.

## Útsagnir um blokkniðurskurðin

*– Høvuðstrupulleikin við hesi niðurskering er, at forarbeiðið er ov illa gjørt. Raksturin sær ikki út til at minka og heldur ikki hava tey á fíggjarmálastýrinum tikið hædd fyri, at inntøkurnar í løtuni eru óvanliga høgar, sigur Magni Laksáfoss*

**Magni Laksáfoss**

*– Tey skerja blokkin uttan at seta nakað ístaðin, tí kunnu vit ikki verða fyri uppskotinum. Sambandsflokkurin er ikki ímóti at hava ein sjálvberandi búskap, men løtan fyri at skerja var ikki tann rætta, sigur Lisbet L. Petersen. Hon vísir á, at vinnan er viðkvom og tað sær út sum alivinnan er í stórum trupulleikum.*

**Lisbeth L. Petersen**

*– Vit eru fegin um, at tað hevur eydnast okkum at skerja blokkin 366 milliónir . Og so er tann upphæddin minni í búskapinum og tað eiga vit at vera greið yvir og at leggja búskaparliga politikkin eftir tí.*

**Karsten Hansen**

## Útsagnir um blokkniðurskurðin

*Vit hoyrdu stjóran í Føroya Banka í grein í Dimmalætting gera vart við, at gulltíðin er liðug. Hetta er so eisini í tráð við tað, sum hendir í løtuni í alingini, í rækjuflotanum, í svartkjaftavinnuni og við toskaprísinum. So her eru nakað, sum kann benda á, at tann stóra vakstrartíðin er av. Tí vil eg spyrja, um tað ikki er óðamannaverk at gera henda stóra niðurskurðin*

**Jóannes Eidesgaard**

*Avleiðingin av blokkniðurskurðinum verður at yvirskotið á fíggjarlógini minkar við somu upphædd. Sum støðan er nú hava vit pláss fyri lækkingini, tí vit hava framvegis eitt avlop á á útvið 200 mio. krónur, hóast blokkurin lækkar við 400 mio. krónum. Vit tola tí at missa 300-400 mio. uttan at tað merkist aðrastaðni í búskapinum*

**Sigurd Poulsen, landsbankastjóri**

*Føroyski búskapurin er so væl fyri í løtuni, sum hann yvirhøvur kann gerast. Vit eiga millum 2-3 milliardir og vit brúka bara 10% av blokkinum. Tí hevði tað ikki verið nakað skrædl, hvarv blokkurin í morgin. Men tað er eyðsæð, at tað er ørrvísi at reka eitt samfelag við blokki og eitt uttan blokk. Vit mugu gerast meiri effektiv fyrst og fremst*

**Hermann Oskarsson, form. í Búskaparráðnum**